Isle of Skye:

# Eitt forvitnisligt oyggja

**Sum greitt varð frá í Sosialinum í seinastu viku var í døgunum 11-14. mai ein bólkur úr Føroyum á vitjan á oynni Skye, vestantil í Skotlandi. Ferðin var fyriskipað av Óla Breckmann, sum fyrr hevur skipað fyri líknandi ferðum**





*Her síggja vit hvar Isle of Skye er. Sum tað sæst hevur Sleat, har bólkurin vitjaði, ferjusamband við Mallaig*

VITJAN
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Henda vitjan var ein partur av royndunum at fáa skapað samband millum oyggjasamfeløgini bæði. Serstakliga var vitjanin ætlað sum ein kunning um arbeiðið, sum verður gjørt á Isle of Skye at varðveita og menna gæliska málið, sum er tað upprunaliga málið í hesum partinum av Skotlandi. Fremsti talsmaðurin fyri hesum royndum á Isle of Sky er Sir Iain Noble, sum er maðurin aftan fyri gæliska lærda háskúlan á Skye, sum verður umrøddur í eini seinni grein. Noble er sannførdur um, at orsøkin til, at tað hevur gingist so væl í Føroyum, er, at føroyingar hava sítt egna mál og egnan samleika, og at hetta eisini er loysnin fyri skotar.

Hetta er tann fyrsta frásøgnin frá hesi áhugaverdu ferðini. Tær næstu fara at snúgva seg um gæliska háskúlan og um Sir Iaian Noble sjálvan.

Í hesi grein verður greitt frá hesum lítla oyggjasamfelag, sum vit hava heilt fitt til felags við. Hetta er ikki minst aktuelt nú vit, umframt flogrutuna til Skotlands, eisini sleppa hagar við Norrønu, og tá verður lætt at koma til pláss sum Isle of Skye við bili. Tað er nevniliga brúgv yvir á oynna. Í hesum sambandi kann nevnast, at í fyrstuni var nógv rok um brúnna, sum kom í 1995, tí nógv noktaðu at gjalda brúgvagjald, sum var eitt tað hægsta í Europa. Men síðan 2004 er brúgvagjaldið avtikið.

Vit fingu á ferðini váttan fyri, at tað eisini á Isle of Skye er áhugi fyri Føroyum. Í hesi vikuni er tíðindamaðurin Cailean Machean í Føroyar í samband við, at hann ætlar at gera sjónvarpssendingar úr Føroyum á gæliskum, sum síðan skulu sendast í BBC.

### Nakað størri ein Føroyar

Oyggin Skye er gott og væl til støddar sum Føroyar, einar 1.700 ferkm. Høvuðsbýurin er Portree við umleið 3.000 íbúgvum. Gongdin í fólkatalinum hevur verið tann mótsetta av gongdini í Føroyum. Í 1841 búðu 23.000 fólk á Skye. Tá vóru færri enn 10.000 í Føroyum. Í 1971 var fólkatalið komið niður á 7.000 og er síðan hækkað aftur til eini 12.000, og roknað verður við framhaldandi vøkstri. Hetta merkir, at hetta er eitt av teimum fáu økjunum í skotska útjaðaranum, har fólkatalið økist. Hetta kemur fyrst og fremst av, at arbeiðsloysið er lítið, og tað er eisini minkandi, og hetta koma vit aftur til í tær komandi greinirnar.

Høvuðsvinnan er ferðafólkavitjan, og er tað lætt at skilja, so vakurt sum her er. Almenn umsiting, sum fyrst og fremst liggur í Portree, munar væl. Tað er nakað av fiskivinnu, landbúnaði og smáídnaði sum til dømis whiskyframleiðsla.

### Eitt sindur av fiskivinnu

Vit tosaðu vit ein fiskimann í bygdini Elgol. Her er fiskiveiða høvuðsvinnan. Í bygdini eru áttta bátar, sum dreggja eftir jákupsskel og gevur hetta fitt av arbeiði. Men her merkja teir eisini altjóðagerðina. Skeljarnar verða partvíst sendar við flogfari til Taiwan at pilka ella hola, og so verður lidna vøran flogin heim afttur! Hetta verður gjørt hóast uppá seg lágt lønarlag har á leiðini.

Ein trupulleiki hjá fiskimonnum her er, at inni á meginlandinum ber til at fáa tollfría olju fleiri staðni, men hetta ber ikki til á Isle of Skye. Fiskimenn skilja ikki hendan mismun og royna at fáa hann rættaðan.

### Gudstænasta uttan ljóðføri

Samfelagið er rættiliga konservativt eins og oyggjasamfeløg ofta eru. Har eru framvegis kirkjur, har tey ikki vilja hava orgul ella annað ljóðføri, eins og tað var her á landi fyri einum 100 árum síðan. Tað stríð, sum vit høvdu tá í Føroyum, hava tey framvegis, við spliti millum kirkjurnar. Í kirkjuni eru forsangarar og sungið verður beinleiðis úr Dávids sálmum í Bíbliuni. Lagið tykist at vera tað sama til allar sálmar og minnir ikki sørt um Kingo.

Á eini samkomu vóru vit spurdir um siðin hjá útróðrarmonnum hjá okkum at syngja, tá ið farið var til útróðrar og komið varð aftur. Teir hava havt nakað tað sama sum vit, men hetta vóru sangir, sum vóru gjørdir serstakliga til útróður, og endamálið við hesum sangi var at rógva í takt við sangin.

### Upprunin til Mac Donald

Vit hildu til í Sleat, sum er ein hálvoyggj, og sum er tann partur av Isle of Skye, sum er nærmast brúnni yvir á meginlandið. Hetta er kanska eisini tann partur av oynni, har viðurskiftini líkast mest teimum á fastlandinum.

Sleat man vera um 100 ferkilometrar til støddar, umleið sum Borðoy, og her búgva um 800 fólk spjadd í smáum bygdum "townships". Verður farið nóg langt aftur í tíðina hevur fólkatalið verið 2.000 í økinum, men í mun til tey seinastu árini hevur fólkatalið ment seg aftur.

Øll kenna ættarnavnið Mac Donald. Men tey munnu vera fá